# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# VIRD MENTANARAVRIK

Tað var ein sera hátíðarlig løta í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið, tá Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, handaði Sunnleifi Rasmussen og Jonhardi Mikkelsen ávikavist Mentanarvirðisløn Landsins og Heiðursgávu Landsins.

Her vórðu valdir tveir menn, sum hava gjørt sera nógv fyri at ríka um okkara mentanarlív – og báðir hava teir brotið upp úr nýggjum á hvør sínum øki.

Sunnleif Rasmussen hevur skapt tónlist á sera høgum støði, og verk hansara eru kend víða um í heiminum. Hann er bæði modernaður og traditionellur við sínum tónleiki. Øll kenna vit hansara tónleik – eisini tey, sum als ikki hava áhuga fyri klassiskum tónleiki, tí hann er so eyðkendur, ella sum landsstýriskvinnan segði, *hann er stórfingin og ógvisligur, framsøkin og kravmikil. Hann er kompromileysur, eksperimenterandi og fullkomiliga sín egin.*

Hin mentamaðurin, sum var heiðraður, var Jonhard Mikkelsen í Vestmanna. Vit sum gingu í Hoydølum fyri út við tríati árum síðani lærdu at kenna henda unga vestmenningin, sum undirvísti í føroyskum. Hann var øðrvísi enn hinir lærararnir, sum hann gekk upp í uppgávuna við lív og sál og veipandi ørmum.

Men tað er kortini fyri bókaútgávu, at hann varð heiðraður fríggjakvøldið. Hann hevur á forlagnum Sprotanum givið út fleiri enn 100 bøkur við rættiliga ymsum innihaldi. Ella fyri enn einaferð at endurgeva landsstýriskvinnuna: *heilt frá smáum yrkingasøvnum til stórar skaldsøgur til bøkur um føroyska málið, uppaling, skaldsøgugreining og snarskeið í stavseting, ja tú kanst siga: frá orðálvi til ull.*

Vit eiga at fegnast um, at vit hava slíkar eldsálir, sum hesar báðar menn. Tí tað er slíkur eldhugi, sum nørir um mentan okkara, í hesum føri tónleikaliga og málsliga. Hóast tiltakið við mentanarvirðisløn og heiðursgávu landsins er sera gott, so sakna vit tó viljan hjá landinum til at dugna meira á mentanarliga økinum.

Tað varð nevnt um Jonhard Mikkelsen, at tá hann ikki slapp



at geva eina bók út hjá Skúlabókagrunninum, so fór hann í Sparikassan og tók eitt lán í staðin – og so kom bókin út, sum kanska var beinleiðis elvingin til Sprotan?

Takið bara orðabókaarbeiðið hjá Sprotanum. Her er gjørt eitt megnar arbeiði, eitt arbeiði, sum valla er grundað á handilsskap, tí hvussu skalt tú kunna gerast ríkur av gera orðabøkur í Føroyum? Tað er fantastiskt, at eitt privat forlag skal megnar at gera orðabøkur, sum eisini eru teldutøkar á internetinum, sum lata dyr upp til fleiri heimsins mál. Slíkt mentanaravrik hevur nógv størri virði, enn vit geva okkum gætur. Gævi tey ráðandi kunnu skilja og læra av hesum.

**»» Sunnleif og Jonhard hava ríkað okkara mentanarlív**

## Man Flossi ávirka Kringvarpið?

Seinastu tíðina hava bæði Dimmalætting og Sosialurin funnist at ymsum viðurskiftum viðvíkjandi Tryggingarfelagnum Føroyar. Serliga eru tað viðurskiftini kring umboðsráðið, nevnd og stjórn, sum minna alt ov nógv um skeiva bygnaðin í Eik Banka.

Meðan Dimmalætting skrivar síðu upp og síðu niður, og Sosialurin í fleiri oddagreinum hevur funnist at hesum viðurskiftum, so hevur evnið als ikki áhuga í tíðindadeildini hjá Kringvarpinum, hvørki í sjónvarpi ella útvarpi.

Nú er Kringvarpið ein public service støð, sum vit øll eru tvungin at gjalda fyri. Men Kringvarpið er eisini ein kommersiell støð - ein støð, hvørs lívsgrundarlag er tengt at, hvussu nógv vinnulívið vil gjalda fyri lýsingarnar.



*Við Trygva og Flossa hevur Tryggingarfelagið Føroyar sponsoerað Deg og Viku hjá Kringvarpinum í langa tíð*

Ein tann besti kundin hjá Kringvarpinum er Tryggingarfelagið Føroyar. Tryggingarfelagið er sponsorur hjá Degi & Viku, sum er flaggskipið hjá sjónvarpinum. Kann tað vera so galið, at Kringvarpið ikki vil viðgera hetta evni av ótta fyri at missa lýsingarpengar frá Tryggingarfelagnum Føroyar?

Nei, vit spyrja bara, tí tað kann vera óheppið, um lýsingarsøla ávirkar tíðindaflutningin. Men soleiðis vilja politikararnir hava tað, og hetta eru treytirnar hjá Kringvarpinum.

So Trygvi og Flossi hava kanska stóran týdning fyri Tryggingarfelagið...

## Átala mergsúgvarar

– Nú má svansið við fólksins peningi halda uppat!

Tað sigur floksleiðslan hjá Javnaðarflokkinum, sum átalar »tað oyðsl við fólksins peningi, ið nevnd og stjórin í Tryggingarfelagnum Føroyar nú um dagarnar fremur«, sum sagt verður í yvirlýsingini frá Javnaðarflokkinum.

Tað er sjálvandi gott, at ein politiskur flokkur tekur slíkt mál upp. Men latið tað nú ikki bara blíva til snakk!

Mergsúgving av fólksins peningini er av tí ónda. Tað er tað altíð, tá fólk, sum sita við valdi, kráma pening til sín sjálvs.

Men tað hevði sjálvandi sømt seg, sum politikarar gingu sum fyrimyndir á øllum økjum – eisini tá tað snýr seg um pensjónsviðurskiftini...



**»» Latið tingformann stýra**

JÓANES N. DALSGAARD
KJAK Á SÍÐU 29



**»» Spæla hassard við pensjónini**

ELIN J. RASMUSSEN
KJAK Á SÍÐU 10

## Fundur um autismu og Aspergers syndrom



– Hvat er autisma í mun til Aspergers syndrom? Hesin spurningur verður reistur, tá Autismufelagið skipar fyri fundi í Miðlahúsinum í annaðkvøld, týskvøldið klokkan 19 - 21:30, tí tá skipar Autismufelagið fyri fundi í Miðlahúsinum, har Lennart Pedersen, chefpsykologur frá Center for Autisme í Danmark fer at halda fyrilestu um, hvat autisma er í mun til Aspergers Syndrom.

Hvussu eru diagnosurnar autisma og Aspergers syndrom nýttar í dag? Er nakar munur á børnum, sum bera brekið infantil autisma og børnum, sum bera brekið Aspergers syndrom? Er munur á teirra menning og framtíðarútlitum?

Í hesum døgum verður arbeitt við at endurskoða verandi flokking av diagnosunum, sum stórur partur av heiminum í dag nýtir:

»ICD-10« sum er ment innan WHO heilsustovnin hjá ST, og sum verður nýtt millum annað í Føroyum og Danmark. »DSM-IV« sum er flokkingin av diagnosum innan sálarligar sjúkur í Amerika, og sum millum annað eisini verður nýtt í Svøríki.

Hvat hendir við staðfesting av diagnosum innan autismuøkið, hvørjar broytingar fara fram. Og hvat merkir hetta fyri børn og vaksin, sum frammanundan hava staðfest eina diaøgnosu?

Fundurin við Lennart Pedersen verður sum sagt í Miðlahúsinum í annaðkvøld, týskvøldið klokkan 19-21:30.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*